# Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

## § 1. Starvsetan

Hesin sáttmálin fevnir um maskinmeistarar í tænastu hjá SEV.

Stk. 2.
Um so er, at starvið arbeiðsliga, fyrisitingarliga ella á annan hátt hevur eina tílíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytum fyri niðanfyri ásettu lønum v. m., verður maskinmeistara veitt eykaviðbót.Viðbøtur og møguligar aðrar sømdir verða veittar eftir avtalu millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Stk. 3.
Tá ið starv verður lýst leyst, verður hetta lýst í minst einum føroyskum blaði. Lýsast skal, hvat starvið umfatar og hvørjum lønarflokki, starvið verður lønt eftir. Í serstøkum førum kann SEV í samráð við Maskinmeistarafelagið víkja frá hesi áseting.

Stk. 4.
Tá starvið er sett, skal tann, ið starvið hevur fingið, beinanvegin fáa setanarbræv frá SEV, við starvslýsing, arbeiðsstað, lønarflokking við starvsaldri.

## § 2. Lønir

Maskinmeistarar verða løntir eftir hjáløgdu lønartalvum sambært setanartreytir.

Stk. 2.
Teir áður avtalaðu 3 frídagarnir árliga verða varðveittir í sáttmálaskeiðnum.

Stk. 3.
Persónar, ið hava maskinistprógv ella føroyska maskinmeistaraprógvið verða løntir í 3**.** lønarflokki.
Persónar við 2-ára maskinmeistaraútbúgving verða løntir í 4. lønarflokki.
Teir vaktgangandi maskinmeistararnir við fullari maskinmeistaraútbúgving, sum nú eru í 4. lønarflokki (í løtuni tveir í tali, men seinni verða teir tríggir), verða umflokkaðir til 5. lønarflokk, men treytað av, at teir eftir tørvi og nærri boðum frá leiðsluni á verkinum eru til reiðar at luttaka í vaktarskipanini sum 1. maður á vakt sum avloysari í avmarkað tíðarskeið, t. d. eina ella nakrar vaktir í senn.
Vaktmeistarar (1. maður á vakt á Fossaverkinum, Sundsverkinum og Vágsverkinum) verða løntir í 6**.** lønarflokki. Treytin fyri at vera í 6. lønarflokki ella hægri er víðkað/3 ára maskinmeistaraútbúgving. Annars í 5**.** lønarflokki.
1. Meistarin í Suðuroy og á Sundi verða løntir í 7**.** lønarflokki.
Verkmeistari í Norðoyggjum verður løntur í 9. lønarflokki.
Verkmeistari í Suðuroy og í Vestmanna verður løntur í 10. lønarflokki.
Verkmeistari á Sundi og leiðandi medarbeiðarin á Framleiðsludeildini verða løntir í 11. lønarflokki.

Stk. 4.
Lønaraldur verður roknaður frá tí degi, viðkomandi hevur tikið seinasta prógv, um so er, at viðkomandi hevur tikist við maskinmeistaraarbeiði ella arbeiði, sum kann javnmetast við slíkt. Lønaraldurin verður rundaður uppeftir til heilan mánað.

Fyri størv, ið verða lønt í 8. lønarflokki ella hægri, verður lønaraldurin ásettur í samráð millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Stk. 5.

a)
Fyri maskinmeistarar við niðursettari arbeiðstíð verður lønin roknað lutfalsliga í mun til niðursetta tímatalið.

b)
Er talan um arbeiðstíð minni enn 21 tímar, verður lønaraldurin roknaður lutfalsliga í mun til niðursetta tímatalið. Aðrar arbeiðstíðir roknast at geva fullan lønaraldur.

Stk. 6.
Onnur størv hjá SEV, har bæði fólk við maskinmeistaraútbúgving og øðrum útbúgvingum eru kvalifiseraði til viðkomandi starv, t. d. kaðal – og linjumeistarar og verkstaðarfólk, verða lønt eftir serstøkum avtalum, har fyrilit verður tikið fyri, hvussu slík størv sum heild verða lønt. Sáttmálin umfatar ikki størv, har einki krav er um maskinmeistarútbúgving, t. d. teir, ið passa motorarnar á útoyggjum.

## § 3. Trygging

SEV eftirheldir í lønini hjá hvørjum maskinmeistara tað til eina og hvørja tíð galdandi tryggingargjald fyri felags lívs- og vanlukkutrygging, sum verður flutt til Maskinmeistarafelagið.

## §. 4. Eftirlønarskipan

Frá 01.03.2003 rindar SEV sum arbeiðisgevarapart 7 % og eftirheldir og rindar sum løntakarapart 3,5 % av stigalønini sambært § 2 stk. 3 til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan.
Frá 01.03.2004 rindar SEV sum arbeiðisgevarapart 8 % og eftirheldir og rindar sum lønatakarapart 4 % í eftirlønarskipanina.
Eftirløn verður ikki roknað av úrtíðarlønum, frítíðarískoyti, viðbótum, vaktargjøldum v.m.

Stk. 2.
Tey, sum frammanundan hava aðra í minsta lagi líka góða eftirlønarskipan, sum tann frammanfyri nevnda, og har inngjøldini í minsta lagi eru ájøvn hesa, kunnu fáa eftirlønargjøldini útgoldin sum ikki eftirlønargevandi løn.

Stk. 3.
Partarnir eru samdir um, at hesir maskinmeistarar sjálvir kunnu avgera, um avtalaða eftirlønargjaldið skal flytast í eina eftirlønarskipan ella útgjaldast teimum sum løn:

1. Maskinmeistarar, sum eru 58 ár og eldri, tá ið teir verða settir í starv hjá SEV.

2. Maskinmeistarar í tíðaravmarkaðum starvi, herundir fyribilshjálp, feriuavloysarar og farloyvisavloysarar.

<u>Stk. 4.</u>
Tímaløntir maskinmeistarar fáa tann í stk. 1 nevnda arbeiðsgevarapart av eftirlønini lagdan afturat tímalønini sambært § 7 stk. 1 fyri vanligar dagtímar, men ikki fyri úrtíðarløn og viðbøtur.
Teir kunnu sjálvir avgera, um arbeiðisgevaraparturin av eftirlønini skal útgjaldast sum A-inntøka ella rindast til eftirlønarskipan.

## § 5. Arbeiðstíð

Vanliga arbeiðstíðin er 37 tímar um vikuna, mattíð ikki íroknað.
Tá vaktirnar verða lagdar, skal hetta í mest møguligan mun verða gjørt í tráð við ynski maskinmeistaranna.

## § 6. Eykagjøld

Fyri vaktararbeiði verða latin eykagjøld samsvarandi lønartalvum (eykagjøldini hækka til eina og hvørja tíð við sama % sum lønirnar):

1. Fyri arbeiði yrkadagar frá kl. $17^{00}$ til $07^{00}$ verður latið eykagjald I
2. Fyri arbeiði frá kl. $17^{00}$ fríggjadag til $07^{00}$ mánamorgun verður latið eykagjald II
3. Fyri arbeiði halgidagar verður latið eykagjald II, og tá verða dagarnir roknaðir frá kl. $17^{00}$ kvøldi fyri til $24^{00}$.
   Fyri arbeiði ólavsøku-, jóla-, nýggjarsáftan, flaggdagin og grundlógardagin verður latið eykagjald II frá kl. $00^{00}$ til $24^{00}$ tá nevndu dagar ikki eru leygar-, sunnu- og halgidagar.
4. Fyri arbeiði millum kl. $00^{00}$ til $07^{00}$ verður veitt eykagjald III. Hetta er galdandi allar dagar.

<u>Stk. 2.</u>
Maskinmeistarar, sum hava tilkallivakt afturat vanligari arbeiðstíð fáa sum samsýning undir tilkallivakt yrkadagar eykagjald I um tíman.
Fyri leygar-, sunnu- og halgidagar og føstu frídagarnar sambært § 9 verður latið eykagjald II um tíman.
Gjaldið verður annars ásett eftir somu klokkutíðum sum í stk. 1.

<u>Stk. 3.</u>
Tá vaktarskiftið er, skal maskinmeistari, ið kemur á vakt, møta 15 min. áðrenn klokkutíman, til at móttaka munnliga handan av vaktini. Hetta verður roknað sum vanlig arbeiðstíð.

<u>Stk. 4.</u>
Nevndu eykagjøld verða ikki latin saman við úrtíðarløn, eins og úrtíðarløn ikki verður veitt undir tilkallivakt.
Fyri arbeiði undir tilkallivakt verður veitt úrtíðarløn sambært § 8.

## § 7. Tímaløn.

Tímaløn er bruttománaðarløn býtt sundur við 160. Bruttománaðarlønin er lønin sambært lønartalvu, men ikki eftirlønargjøld, úrtíðargjøld og serligar veitingar.

<u>Stk. 2.</u>

Tá maskinmeistarar luttaka ein heilan dag í skeiðvirksemi, sum er fyriskipað av SEV vaktlistafrídagar, verður veitt teimum samsýning samsvarandi til 8 tímar dagløn, ella 8 tímar til avspáking.

Stk. 3.
Tá maskinmeistari ynskir at luttaka á eftirútbúgvingarskeiðum, kann hann eftir umsókn fáa farloyvi til hetta uttan, partvís við, ella við løn. Skeiðkostnaðurin kann eftir umsókn endurrindast honum, tá SEV heldur umstøðurnar tala fyri tí.

## § 8. Úrtíðarløn.

Úrtíðararbeiði eigur helst ikki at vera.
Fyri úrtíðararbeiði verður goldin úrtíðarløn afturat vanligu dagtímalønini soleiðis:

Fyri 1. , 2. og 3. tíman verður goldið 50 %.
Fyri 4. og eftirfylgjandi yvirtímar eins og fyri arbeiði leygar- , sunnu- og teir í § 9 nevndu frídagar 100%
Her verða dagarnir roknaðir frá kl. 00.00 til kl. 24.00.
Úrtíðargjald verður latið fyri hvønn ½ byrjaðan tíma.
Maskinmeistarar í lønarflokki 8 og uppeftir fáa ikki úrtíðarløn.
Tó skal, um álagt verður teimum drúgt úrtíðararbeiði, verða veitt teimum hóskandi samsýning eftir umsókn.

Stk. 2.
Úrtíðararbeiði kann verða avspákað.
Um maskinmeistari sjálvur ynskir, at so skal vera, og arbeiðið eftir ætlanini hjá SEV loyvir hesum, tá skal tað bera til, at maskinmeistari fær frítíð ígildis úrtíðararbeiði í mun til ásetingarnar í § 8. stk. 1. í hesum sáttmála. Ber ikki til at halda frí, tá maskinmeistari ynskir tað, skal avtalast, nær uppsparda frítíðin kann verða hildin ístaðin.
Maskinmeistari kann krevja, at hetta verður innan 3 mánaðir.
Har arbeitt verður eftir vaktarlista, skal tann avtalaða frítíðin fyri úrtíðararbeiði viðmerkjast í vaktskipanini, áðrenn hon verður hildin.

Stk. 3.
Maskinmeistari sum hevur arbeitt sína fullu viku og eigur at hava frí, og sum tá verður biðin at koma á vakt áðrenn hann hevur havt frí í tveir fylgjandi dagar, hevur rætt til yvirtíð í 3. tær fyrstu vaktirnar.

Stk. 4.
Fyri úrtíðararbeiði, ið fer út um 2 tímar, eiga maskinmeistarar rætt til ½ tíma mattíð uttan frádrátt.

Stk. 5.
Verður maskinmeistari boðsendur til úrtíðararbeiði, tá viðkomandi er farin av arbeiðsplássinum aftan á loknan arbeiðsdag ella vakt, verður goldin úrtíðarløn fyri í minsta lagi 2 tímar, hóast úrtíðararbeiðið varar styttri tíð.

Hettar er ikki galdandi, um viðkomandi fær tilkallivaktgjald, reiðiviðbót ella aðra samsýning fyri útkall.

## § 9. Fastir frídagar

Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagurin, hvítusunnuaftan,
½ grundlógardagur, ½ Ólavsøkuaftan, Ólavsøkudagur og allir halgidagar eru frídagar.

Stk. 2.
Gongur maskinmeistari vakt á teimum omanfyri nevndu frídøgum, verða hesir avspákaðir tíma fyri tíma.

## § 10. Frítíðarreglur

Frítíðarreglurnar verða sambært løgtingslóg nr.30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.

## § 11. Vaktarbroyting

Tá vaktarbroyting er neyðug, skal sigast frá í minsta lagi 24 tímar frammanundan. Er neyðugt at gera vaktarbroyting við styttri fráboðan enn 24 tímar, verður latið eykagjald kr. 350 einaferð.

## § 12. Fyribils tænasta í hægri starvi

Maskinmeistarar, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi fyribils røkja hægri starv í 7 arbeiðsdagar og meira samfelt, eiga í hesum tíðarskeiði at verða løntir við somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vórðu settir í starvið

## § 13. Skipanarreglur

Á hvørjum verki sær velja maskinmeistararnir ein álitismann og ein varaálitismann.
Hesir velja sínamillum ein felagsálitismann og ein varafelagsálitismann at umboða øll verkini.
Valið av hesum hevur gildi, tá Maskinmeistarafelagið hevur boðað SEV frá.
Val av álitisfólkið skal verða annahvørt ár, tó ikki sama árið, sum sáttmálin gongur út.

Stk. 2.
Í samráð við SEV fær álitismaðurin og/ella felagsálitismaðurin møguleika at taka sær av málum, sum viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum á verkunum í arbeiðstíðini, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

Stk. 3.

Maskinmeistarar, sum eru valdir í nevnd Maskinmeistarafelagsins, skulu fáa heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Semja skal tó í hvørjum einstøkum føri vera millum SEV og Maskinmeistarafelagið um tørvin á slíkum arbeiði.

Stk. 4.
Tá álitisfólk søkja at sleppa á álitisfólkaskeið, fer SEV at viðgerða slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í Maskinmeistarafelagnum.

Stk. 5.
Vegleiðandi starvsfólkapolitikkur verður fyriskipaður.
Hjá SEV verður sett ein samstarvsnevnd, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita.
Samstarvsnevndin skal hava innlit í tey viðurskifti, sum framganga av reglugerð, ið fylgir somu reglum sum hjá Føroya Landsstýri.
Henda reglugerð skal endaliga góðkennast av báðum pørtum, sum hesin sáttmáli umfatar.

## § 14. Farloyvi

Maskinmeistari kann fáa tænastufrí uttan løn, tá tað ikki stríðir ímóti áhugamálunum hjá SEV. Maskinmeistari, sum fær farloyvi í samband við útbúgving, ið tænir áhugamálunum hjá SEV, kann fáa frí við løn ella niðursettari løn. Tænastufrí kann verða givin í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár. Tó skulu maskinmeistarar ið hava starvast longur enn 5 ár, altíð hava rætt til farloyvi í minst 1 ár.

## § 15. Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í arbeiðisørindum verður eftir serligari avtalu.

Stk. 2.
Ferðing í arbeiðisørindum til og frá ikki vanligum arbeiðisstað í Føroyum er at rokna sum arbeiðistíð.
Ferðing ímillum 22.00 og 07.00 verður ikki íroknað, um maskinmeistarin fær ávíst og goldið seingjarpláss.

Stk. 3.
Útreiðslur í maskinmeistarin hevur av ferðing, uppihaldið og mati verður honum endurrindaðar móti rokning

Stk. 4.
Tíðin sum fer til ferðing til skeið uttanbíggja ella uttanlands verður roknað sum arbeiðstíð.

## § 16. Flytisamsýning

Um kraft verður av maskinmeistara, at hann flytir í annað stað at búgva, verða flutningsútreiðslur hansara av húski og húsbúnaði samsýndar honum eftir rokning.

## § 17. Koyripeningur

Samsýning fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum fyri SEV er hin sami sum fyri tænastumenn landsins ella eftir serligari avtalu millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

## § 18. Arbeiðsklæðir

Reglugerðin um arbeiðsklæðir á el-verkunum, sum kom í gildi 1. apríl 1996, er galdandi í sáttmálaskeiðnum.
Partarnir samráðast í sáttmálaskeiðnum um eina endurskoðan av reglugerðini.

## § 19. Sjúka, eftirsituløn og barnsferð

Viðvíkjandi sjúku og eftirsituløn galda reglurnar í starvsmannalógini, tó soleiðis, at eftirsituløn verður veitt í mun til uppsagnartíðini hjá viðkomandi, minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir.

Stk. 2.
Maskinmeistari kann fáa frí við løn, tá barn/børn hansara eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hava teir meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu teir fáa frí upp til 20 dagar.

Stk. 3.
Tá barn/børn hjá maskinmeistara verða løgd inn á sjúkrahús, og annað av foreldrunum verður innlagt við, kann maskinmeistari fáa frí við løn í upp til mest loyvda árliga dagatal sambært stk. 2.

Stk. 4.
Viðvíkjandi barnsferð og ættleiðing verður víst til løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan við tilhoyrandi kunngerðum og møguligum seinni broytingum.

Stk 5.
Maskinmeistarar, ið eru í fastari vaktarskipan og hava náttararbeiði meiri enn 300 tímar um árið hava rætt til ókeypis læknakanning einaferð um árið. Partarnir gera nærri reglur um hetta í sáttmálaskeiðnum.

## § 20. Uppsøgn

## Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

Starvsavtala millum SEV og maskinmeistara kann bert sigast upp til uppathald eftir eini freist, sum er givin frammanundan samsvarandi stk. 2., uttan so, at avtalað er, at arbeiðið er bert fyribils ella sum roynd, og at hesi arbeiðsviðurskiftir vara ikki longur enn 3 mánaðir.
Prógvskylduna fyri, at tílík avtala er gjørd, hevur SEV.

<u>Stk. 2.</u>
Tilsagnarfreistin til uppathald frá SEV kann ikki setast styttri enn:
1 mánað freist til uppathald seinasta í einum mánað í fyrstu 6 mánaðar starvstíð.
3 mánað freist til uppathald seinasta í einum mánað eftir 6 mánaðar starvstíð.
Uppsagnarfreistin verður longd við 1 mánað fyri hvørt 3. starvsárið, tó longst í 6 mánaðar.

<u>Stk. 3.</u>
Uppsøgn maskinmeistarans skal gevast við 1 mánað freist til uppathald seinast í einum mánað, tó so, at í skrivligum sáttmála kann longri uppsagnarfreist frá maskinmeistarans síðu fyrisetast, men treytað av, at uppsagnarfreistin frá SEV verður longd samsvarandi.

<u>Stk.4.</u>
Uppsøgn skal verða givin seinast í mánaðinum frammanundan tí 1., sum uppsagnarfreistin byrjar. Uppsøgnin má gevast í so góðari tíð, at maskinmeistari fær farið frá, innan starvstíðin er úti eftir einari eftir starvstíðini givnari uppsagnarfreist.

<u>Stk. 5</u>
Uppsøgn av maskinmeistara verður at boða viðkomandi skrivliga við grundgeving fyri uppsøgnini.

<u>Stk. 6.</u>
Verður maskinmeistari sagdur at fara úr starvi, og er orsøkin eftir Maskinmeistarafelagsins metan ógrundað, tá eiga SEV og Maskinmeistarafelagið at taka málið til samráðingar og avgerðir sínámillum.

## § 21. Seming og tulking av sáttmálanum

Er sáttmálin uppsagdur, og semja ikki kemur í lag partanna millum, ella annar parturin ber seg undan tingingum, hevur hvør av pørtunum rætt til at fáa tingingar framdar við uppílegging av semingsmanni. Semingsmaðurin verður uppnevndur av pørtunum í felag. Fæst ikki semja um val av semingsmanni, verður hann uppnevndur av sorinskrivaranum. Undir semingsroyndum binda partarnir seg til at ganga undir reglurnar í lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 "om mægling i arbejdsstridigheder" við broytingum § 3 til 6.

<u>Stk. 2.</u>
Ivaspurningar um tulking av sáttmálanum hava partarnir rætt til at viðgera í nevnd, og velur hvør av pørtunum 2 nevndarlimir. Nevndarlimir skulu ikki vera tænastu- ella starvsmenn hjá SEV ella limir í Maskinmeistarafelagnum. Ei heldur mugu limirnir hava nakað tilknýti til partarnar. Kemur nevndin ikki ásamt (vanligur meiriluti), verður dómarin ella av honum nevndur maður ástøðumaður. Skrivlig frásøgn um ósemjuna verður at lata nevndini í seinasta lagi 8 dagar eftir, at hon er sett.

# Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

## § 22. Gildi sáttmálans

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. juli 2006, og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða freist til ein 1. í einum mánað, tó í fyrsta lagi sigast upp at fara úr gildi tann 1. juli 2008

Tórshavn, tann 23. oktober 2006

**Vegna SEV**

Leivur Hansen, (sign.)

Klæmint Weihe, (sign.)

John P. Danielsen, (sign.)

**Vegna Maskinmeistarafelagið**

Jógvan Nybo, (sign.)

Páll Hansen, (sign.)

Regin Olsen, (sign.)

Petur Egholm, (sign.)

Jørgin Mørkøre, (sign

## Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

**FYLGISKJAL II**

## Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á SEV.

### 1. Inngangur

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið SEV hevur, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

- Førleikamenning
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á SEV
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á SEV
- Javnstøða

### 2. Førleikamenning

Leiðsla og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá SEV. Tað er tað arbeið, sum tey í tænastuni inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at SEV mennist.

Partarnir eru tí samdir um, at:

- miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri einum virkisfýsnum stovni við høgum tænastustigi.
- SEV sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur SEV at seta sær miðvís menningarmál.
- endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna tænastuførleikan.
- starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá SEV er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
- sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á SEV.

### 3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á SEV.

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á SEV eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.

## Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

Tá ið SEV evnar sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

**Niðursett tíð**

Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:

a) a) vera fylt 60 ár
b) b) hava starvast hjá SEV seinastu 10 árini
c) c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett.

Starvsfólk kann fara upp í ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.
SEV kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

**Lægri starv**

SEV kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá SEV í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.

Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.

SEV kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á SEV.**

Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.

Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**

Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

# Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

**Lønartalva sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.**

**Galdandi frá 1. juli 2006**

| Lønarbólkar | | | | | | | | | | | Lønarstig | Bruttoløn | Nettoløn | Eftirl.gj. 4 % | Eftirl.gj. 8 % | Eftirl.gj. tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 1 | | | | | | | | | | | 1 | 19.410,22 | 18.633,81 | 776,41 | 1.552,82 | 2.329,23 |
| 2 | | | | | | | | | | | 2 | 19.711,62 | 18.923,15 | 788,46 | 1.576,93 | 2.365,39 |
| 3 | | | | | | | | | | | 3 | 20.013,02 | 19.212,50 | 800,52 | 1.601,04 | 2.401,56 |
| 4 | | | | | | | | | | | 4 | 20.314,42 | 19.501,84 | 812,58 | 1.625,15 | 2.437,73 |
| 5 | **2** | | | | | | | | | | 5 | 20.615,82 | 19.791,19 | 824,63 | 1.649,27 | 2.473,90 |
| 6 | 1 | | | | | | | | | | 6 | 20.917,22 | 20.080,53 | 836,69 | 1.673,38 | 2.510,07 |
| 7 | 2 | | | | | | | | | | 7 | 21.218,62 | 20.369,88 | 848,74 | 1.697,49 | 2.546,23 |
| 8 | 3 | | | | | | | | | | 8 | 21.520,02 | 20.659,22 | 860,8 | 1.721,60 | 2.582,40 |
| | 4 | **3** | | | | | | | | | 9 | 21.821,42 | 20.948,57 | 872,86 | 1.745,71 | 2.618,57 |
| | 5 | 1 | | | | | | | | | 10 | 22.122,82 | 21.237,91 | 884,91 | 1.769,83 | 2.654,74 |
| | 6 | 2 | | | | | | | | | 11 | 22.424,22 | 21.527,26 | 896,97 | 1.793,94 | 2.690,91 |
| | 7 | 3 | | | | | | | | | 12 | 22.725,63 | 21.816,60 | 909,03 | 1.818,05 | 2.727,08 |
| | 8 | 4 | **4** | | | | | | | | 13 | 23.027,03 | 22.105,95 | 921,08 | 1.842,16 | 2.763,24 |
| | | 5 | 1 | | | | | | | | 14 | 23.328,43 | 22.395,29 | 933,14 | 1.866,27 | 2.799,41 |
| | | 6 | 2 | | | | | | | | 15 | 23.629,83 | 22.684,64 | 945,19 | 1.890,39 | 2.835,58 |
| | | 7 | 3 | | | | | | | | 16 | 23.931,23 | 22.973,98 | 957,25 | 1.914,50 | 2.871,75 |
| | | 8 | 4 | | | | | | | | 17 | 24.232,63 | 23.263,32 | 969,31 | 1.938,61 | 2.907,92 |
| | | | 5 | **5** | | | | | | | 18 | 24.534,03 | 23.552,67 | 981,36 | 1.962,72 | 2.944,08 |
| | | | 6 | 1 | | | | | | | 19 | 24.835,43 | 23.842,01 | 993,42 | 1.986,83 | 2.980,25 |
| | | | 7 | 2 | | | | | | | 20 | 25.136,83 | 24.131,36 | 1.005,47 | 2.010,95 | 3.016,42 |
| | | | | 3 | | | | | | | 21 | 25.438,23 | 24.420,70 | 1.017,53 | 2.035,06 | 3.052,59 |
| | | | | 4 | **6** | | | | | | 22 | 25.739,63 | 24.710,05 | 1.029,59 | 2.059,17 | 3.088,76 |
| | | | | 5 | 1 | | | | | | 23 | 26.041,04 | 24.999,39 | 1.041,64 | 2.083,28 | 3.124,92 |
| | | | | 6 | 2 | | | | | | 24 | 26.342,44 | 25.288,74 | 1.053,70 | 2.107,39 | 3.161,09 |
| | | | | 7 | 3 | **7** | | | | | 25 | 26.643,84 | 25.578,08 | 1.065,75 | 2.131,51 | 3.197,26 |
| | | | | | 4 | 1 | | | | | 26 | 26.945,24 | 25.867,43 | 1.077,81 | 2.155,62 | 3.233,43 |
| | | | | | 5 | 2 | | | | | 27 | 27.246,64 | 26.156,77 | 1.089,87 | 2.179,73 | 3.269,60 |
| | | | | | 6 | 3 | **8** | | | | 28 | 27.548,04 | 26.446,12 | 1.101,92 | 2.203,84 | 3.305,76 |
| | | | | | 7 | 4 | 1 | | | | 29 | 27.849,44 | 26.735,46 | 1.113,98 | 2.227,96 | 3.341,93 |
| | | | | | | 5 | 2 | | | | 30 | 28.150,84 | 27.024,81 | 1.126,03 | 2.252,07 | 3.378,10 |
| | | | | | | 6 | 3 | | | | 31 | 28.452,24 | 27.314,15 | 1.138,09 | 2.276,18 | 3.414,27 |
| | | | | | | 7 | 4 | **9** | | | 32 | 28.753,64 | 27.603,50 | 1.150,15 | 2.300,29 | 3.450,44 |
| | | | | | | | 5 | 1 | | | 33 | 29.055,04 | 27.892,84 | 1.162,20 | 2.324,40 | 3.486,61 |
| | | | | | | | 6 | 2 | | | 34 | 29.356,44 | 28.182,19 | 1.174,26 | 2.348,52 | 3.522,77 |
| | | | | | | | 7 | 3 | **10** | | 35 | 29.657,85 | 28.471,53 | 1.186,31 | 2.372,63 | 3.558,94 |
| | | | | | | | | 4 | 1 | | 36 | 29.959,25 | 28.760,88 | 1.198,37 | 2.396,74 | 3.595,11 |
| | | | | | | | | 5 | 2 | | 37 | 30.260,65 | 29.050,22 | 1.210,43 | 2.420,85 | 3.631,28 |
| | | | | | | | | | 3 | | 38 | 30.562,05 | 29.339,57 | 1.222,48 | 2.444,96 | 3.667,45 |
| | | | | | | | | | 4 | **11** | 39 | 30.863,45 | 29.628,91 | 1.234,54 | 2.469,08 | 3.703,61 |
| | | | | | | | | | 5 | 1 | 40 | 31.164,85 | 29.918,26 | 1.246,59 | 2.493,19 | 3.739,78 |
| | | | | | | | | | | 2 | 41 | 31.466,25 | 30.207,60 | 1.258,65 | 2.517,30 | 3.775,95 |
| | | | | | | | | | | 3 | 42 | 31.767,65 | 30.496,95 | 1.270,71 | 2.541,41 | 3.812,12 |
| | | | | | | | | | | 4 | 43 | 32.069,05 | 30.786,29 | 1.282,76 | 2.565,52 | 3.848,29 |

| | |
|---|---|
| Eykagjald I | kr 19,57 |
| Eykagjald II | kr 39,13 |
| Eykagjald III | kr 11,58 |

# Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

**VIÐBØTUR PR. MÁNAÐ EFTIR § 1 STK . 2 Í SÁTTMÁLANUM.**

**1. juli 2006**

| **Heiti** | **Upphædd** |
|---|---|
| a | kr 762,75 |
| b | kr 1.118,70 |
| c | kr 1.474,65 |
| d | kr 1.830,60 |
| e | kr 2.186,55 |
| f | kr 2.542,50 |
| g | kr 3.000,15 |
| h | kr 3.508,65 |
| i | kr 3.966,30 |
| j | kr 4.423,95 |
| k | kr 4.881,60 |
| l | kr 5.440,95 |
| m | kr 6.000,30 |
| n | kr 6.559,65 |
| o | kr 7.017,30 |

Viðbøturnar verða veittar av SEV í hvørjum einstøkum føri aftaná samráðingar
við Maskinmeistarafelagið

# Sáttmáli millum SEV og Maskinmeistarafelagið galdandi frá 1. juli 2006

**Galdandi frá 1. juli 2007**

| Lønarbólkar | | | | | | | | | | Lønarstig | Bruttoløn | Nettoløn | Eftirl.gj. 4 % | Eftirl.gj. 8 % | Eftirl.gj. tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | | | | | | | | | | | | | | | |
| 1 | | | | | | | | | | 1 | 19.895,47 | 19.099,65 | 795,82 | 1.591,64 | 2.387,46 |
| 2 | | | | | | | | | | 2 | 20.204,41 | 19.396,23 | 808,18 | 1.616,35 | 2.424,53 |
| 3 | | | | | | | | | | 3 | 20.513,34 | 19.692,81 | 820,53 | 1.641,07 | 2.461,60 |
| 4 | | | | | | | | | | 4 | 20.822,28 | 19.989,39 | 832,89 | 1.665,78 | 2.498,67 |
| 5 | **2** | | | | | | | | | 5 | 21.131,21 | 20.285,97 | 845,25 | 1.690,50 | 2.535,75 |
| 6 | 1 | | | | | | | | | 6 | 21.440,15 | 20.582,54 | 857,61 | 1.715,21 | 2.572,82 |
| 7 | 2 | | | | | | | | | 7 | 21.749,09 | 20.879,12 | 869,96 | 1.739,93 | 2.609,89 |
| 8 | 3 | | | | | | | | | 8 | 22.058,02 | 21.175,70 | 882,32 | 1.764,64 | 2.646,96 |
| | 4 | **3** | | | | | | | | 9 | 22.366,96 | 21.472,28 | 894,68 | 1.789,36 | 2.684,04 |
| | 5 | 1 | | | | | | | | 10 | 22.675,89 | 21.768,86 | 907,04 | 1.814,07 | 2.721,11 |
| | 6 | 2 | | | | | | | | 11 | 22.984,83 | 22.065,44 | 919,39 | 1.838,79 | 2.758,18 |
| | 7 | 3 | | | | | | | | 12 | 23.293,77 | 22.362,02 | 931,75 | 1.863,50 | 2.795,25 |
| | 8 | 4 | **4** | | | | | | | 13 | 23.602,70 | 22.658,59 | 944,11 | 1.888,22 | 2.832,32 |
| | | 5 | 1 | | | | | | | 14 | 23.911,64 | 22.955,17 | 956,47 | 1.912,93 | 2.869,40 |
| | | 6 | 2 | | | | | | | 15 | 24.220,57 | 23.251,75 | 968,82 | 1.937,65 | 2.906,47 |
| | | 7 | 3 | | | | | | | 16 | 24.529,51 | 23.548,33 | 981,18 | 1.962,36 | 2.943,54 |
| | | 8 | 4 | | | | | | | 17 | 24.838,45 | 23.844,91 | 993,54 | 1.987,08 | 2.980,61 |
| | | | 5 | **5** | | | | | | 18 | 25.147,38 | 24.141,49 | 1.005,90 | 2.011,79 | 3.017,69 |
| | | | 6 | 1 | | | | | | 19 | 25.456,32 | 24.438,06 | 1.018,25 | 2.036,51 | 3.054,76 |
| | | | 7 | 2 | | | | | | 20 | 25.765,25 | 24.734,64 | 1.030,61 | 2.061,22 | 3.091,83 |
| | | | | 3 | | | | | | 21 | 26.074,19 | 25.031,22 | 1.042,97 | 2.085,94 | 3.128,90 |
| | | | | 4 | **6** | | | | | 22 | 26.383,13 | 25.327,80 | 1.055,33 | 2.110,65 | 3.165,98 |
| | | | | 5 | 1 | | | | | 23 | 26.692,06 | 25.624,38 | 1.067,68 | 2.135,36 | 3.203,05 |
| | | | | 6 | 2 | | | | | 24 | 27.001,00 | 25.920,96 | 1.080,04 | 2.160,08 | 3.240,12 |
| | | | | 7 | 3 | **7** | | | | 25 | 27.309,93 | 26.217,54 | 1.092,40 | 2.184,79 | 3.277,19 |
| | | | | | 4 | 1 | | | | 26 | 27.618,87 | 26.514,11 | 1.104,75 | 2.209,51 | 3.314,26 |
| | | | | | 5 | 2 | | | | 27 | 27.927,80 | 26.810,69 | 1.117,11 | 2.234,22 | 3.351,34 |
| | | | | | 6 | 3 | **8** | | | 28 | 28.236,74 | 27.107,27 | 1.129,47 | 2.258,94 | 3.388,41 |
| | | | | | 7 | 4 | 1 | | | 29 | 28.545,68 | 27.403,85 | 1.141,83 | 2.283,65 | 3.425,48 |
| | | | | | | 5 | 2 | | | 30 | 28.854,61 | 27.700,43 | 1.154,18 | 2.308,37 | 3.462,55 |
| | | | | | | 6 | 3 | | | 31 | 29.163,55 | 27.997,01 | 1.166,54 | 2.333,08 | 3.499,63 |
| | | | | | | 7 | 4 | **9** | | 32 | 29.472,48 | 28.293,58 | 1.178,90 | 2.357,80 | 3.536,70 |
| | | | | | | | 5 | 1 | | 33 | 29.781,42 | 28.590,16 | 1.191,26 | 2.382,51 | 3.573,77 |
| | | | | | | | 6 | 2 | | 34 | 30.090,36 | 28.886,74 | 1.203,61 | 2.407,23 | 3.610,84 |
| | | | | | | | 7 | 3 | **10** | 35 | 30.399,29 | 29.183,32 | 1.215,97 | 2.431,94 | 3.647,91 |
| | | | | | | | | 4 | 1 | 36 | 30.708,23 | 29.479,90 | 1.228,33 | 2.456,66 | 3.684,99 |
| | | | | | | | | 5 | 2 | 37 | 31.017,16 | 29.776,48 | 1.240,69 | 2.481,37 | 3.722,06 |
| | | | | | | | | | 3 | 38 | 31.326,10 | 30.073,06 | 1.253,04 | 2.506,09 | 3.759,13 |
| | | | | | | | **11** | | 4 | 39 | 31.635,04 | 30.369,63 | 1.265,40 | 2.530,80 | 3.796,20 |
| | | | | | | | 1 | | 5 | 40 | 31.943,97 | 30.666,21 | 1.277,76 | 2.555,52 | 3.833,28 |
| | | | | | | | 2 | | | 41 | 32.252,91 | 30.962,79 | 1.290,12 | 2.580,23 | 3.870,35 |
| | | | | | | | 3 | | | 42 | 32.561,84 | 31.259,37 | 1.302,47 | 2.604,95 | 3.907,42 |
| | | | | | | | 4 | | | 43 | 32.870,78 | 31.555,95 | 1.314,83 | 2.629,66 | 3.944,49 |

| | |
|---|---|
| Eykagjald I | kr 20,06 |
| Eykagjald II | kr 40,11 |
| Eykagjald III | kr 11,87 |

**VIÐBØTUR PR. MÁNAÐ EFTIR § 1 STK . 2 Í SÁTTMÁLANUM.**

**1. juli 2007**

| **Heiti** | **Upphædd** |
|---|---|
| a | kr 781,82 |
| b | kr 1.146,67 |
| c | kr 1.511,52 |
| d | kr 1.876,37 |
| e | kr 2.241,21 |
| f | kr 2.606,06 |
| g | kr 3.075,15 |
| h | kr 3.596,37 |
| i | kr 4.065,46 |
| j | kr 4.534,55 |
| k | kr 5.003,64 |
| l | kr 5.576,97 |
| m | kr 6.150,31 |
| n | kr 6.723,64 |
| o | kr 7.192,73 |

Viðbøturnar verða veittar av SEV í hvørjum einstøkum føri aftaná samráðingar